# Verkafeløg vilja tryggja 100 arbeiðspláss

**AREBIÐSPLÁSS** Havnar Arbeiðskvinnufelag og Havnar Arbeiðsmannafelag arbeiða við at savna 10 milliónir krónur at fáa fiskavirkið í høvuðstaðnum latið uppaftur

Eirikur Lindenskov

– Hetta gera vit við at tryggja, at tað framhaldandi verður virkaður fiskur í býnum!

Soleiðis siga tey bæði verkafeløgini, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, sum eru farin at savna penging til at fáa latið uppaftur fiskavirkið í býnum.

Feløgin siga, at fyrsta treytin er, at virkið verður rikið á handilsligum grundarlag.

– Okkara sannføring er, at einans rakstur á handilsligum grundalag kann tryggja hesi hundrað arbeiðsplássini, siga feløgini.

Útrokningar, sum eru gjørdar fyri feløgini vísa, hesar 10 milliónir krónurnar fara at føra við sær:

- at umleið 100 arbeiðspláss aftur verða sett á stovn í Havn
- at hetta fer at føra við sær eina árliga lønarútgjalding á umleið kr 32 milliónir
- at lønarútgjaldingarnar fara at føra við sær framhaldandi privatan eftirspurning eftir vørum og tænastum í Havn
- at lønarútgjaldingarnar tí fara at tryggja grundarlagið undir vinnulívinum í Havn
- at árliga úrslitið áðrenn skatt á nýggja virkinum fer at liggja omanfyri kr 5 mió

Feløgini siga, at rávørugrundarlagið undir virkinum verður frystur fiskur umframt feskur fiskur. Væntað verður, at 6.000 tons verða virkað árliga á virkinum. Herumframt verður góðskingarvirkið nýtt til pakking og góðsking av fiski – eisini frá øðrum virkjum í Føroyum.

– Tað er einans virkið í Havn, sum hevur møguleika fyri hesum, siga feløgini, sum leggja dent á, at ein treyt fyri virkseminum er, at Tórshavnar Kommuna keypir




bygningin og maskinurnar á Vestaru bryggju.

– Vit vóna, at tú ynskir at hjálpa okkum at tryggja fíggjarliga grundarlagið undir nýggja virkinum, siga Havnar Arbeiðskvinnufelag og Havnar Arbeiðsmannafelag í felags áheitan.



*Aksel V. Johannesen mælir til at gera eina fyribilsloysn, meðan samráðst verður*

# Miða eftir fyribilssáttmála fyri ergoterapi

**Um Ergoterapeutfelagið gongur við til tað, verður fyribils sáttmáli gjørdur mánadagin, so børn við limabreki og varðandi sjúkum kunnu fáa ergoterapi goldna av Heilsutrygd**

Randi Jacobsen

Vegna sáttmálaloysi millum Heilsutrygd og Ergoterapifelagið hevur Heilsutrygd seinastu mánaðirnar ikki goldið fyri ergoterapi til børn við limasbreki ella varðandi sjúku.

Men nú er ljós fyri stavn.

Heilsumálaráðið hevur gjørt eitt uppskot til sáttmála, og hetta uppskot verður lagt fram á fundi mánadagin millum Heilsumálaráðið og Heilsutrygd øðrumegin og Ergoterapifelagið hinumegin.

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður heldur ikki, at børnini longur kunnu bíða eftir eini loysn.

- Vit miða eftir at gera ein fyribilssáttmála longu mánadagin, soleiðis at ein skipan er at gjalda út eftir. So er bara spurningurin um Ergoterapifelagið góðtekur hesa fyribilsloysnina, sigur Aksel V. Johannesen.

Hann hugsar sær, at hesin fyribils sáttmálin skal vera í gildi, til semja er gjørd um regluligan sáttmála.